# Leiðari
## til Dagstovnin í Kvívík

Kvívíkar kommuna søkir eftir leiðara til Dagstovnin í Kvívík til at byrja 1. apríl 2004, ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin umfatar vøggustovu við 10 børnum í aldrinum 0 til 3 ár, barnagarð við 20 børnum í aldrinum 3 til 6 ár, frítíðarskúla við plássi til 16 børn eins og dagrøkt, har tað í løtuni verða 6 børn ansað.

Kommunan kann bjóða eitt áhugavert og avbjóðandi starv í einum lítlum stovni í góðum umhvørvi, har tú fært møguleika at gera tína ávirkan galdandi.

Vit ynskja at umsøkjarin
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- er til reiðar at fara virkin til verka, og sum ein partur av starvsfólkabólkinum
- hevur hug og vilja at seta sín dám á virksemið, og saman við starvsfólkunum at menna tað pedagogiska arbeiðið á stovninum
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag, merktan av virðing og umsorgan fyri børnum, og kann virka í góðum samstarvi við foreldur og starvsfelagar
- er opin, positivur og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis

Starvið verður sett sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Heina Holm, bygdarráðsformann, á tlf. 421294, ella á tlf. 210294.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal innan 22. mars 2004 sendast til:

**Kvívíkar kommunu**
**Postboks 30**
**FO-340 Kvívík**


Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Eykalutir til bilar

Eykalutir og alt annað til bilar, eisini til US bilar, fáast fyri ein bíligan pening.

Bilarnir koma vanliga úr Týsklandi og Hollandi.

Alt pappírsarbeiði verður avgreitt.

Send ein teldupost við tygara ynskjum.

Sosialurin 341800

**Finn Nielsen**
Tel (0045) 23 44 07 25
finn@usparts.dk · www.usparts.dk


LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi e.l. til havnadeildina hjá stovninum. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum, hydrografiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru hesar:
- Hevur hald og rakstur av havnum og lendingum um hendi
- Fysisk planlegging á sjónum
- Programmeringar, forkanningar og prosjektgransking
- Fakeftirlit við verkætlanum og
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella líknandi - helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum. Harafturat kundu vit hugsað okkum, at umsøkjarin hevur edv kunnleika viðv. perl scripting, dátugrunni, dynamiskari heimasíðu og hagfrøðiligari dátuviðgerð. Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2004. Brævbjálvin eigur at merkjast »Verkfrøðingur til havnadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Ewaldi Kjølbro á tel. 31 13 33, lokal 316, (e-postur: ewald@lv.fo) ella fartel. 540 861.

Sjálvuppgávan 2003

Freistin hjá persónligum skattgjaldarum, ið ikki hava roknskaparskyldu, at lata inn

sjálvuppgávu
ognaruppgerð
kapitalvinningssjálvuppgávu

er mánadagin 15. mars 2004.

Sí eisini bóklingin “skatturin 2003” og heimasíðuna **www.tollskatt.fo**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Argir 9. mars 2004

Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

# Skrivstovufólk

Vegna farloyvi verður søkt eftir skrivstovufólki til fulltíðarstarv í tíðarskeiðinum 1. apríl 2004 til 1. mei 2005.

**Starvslýsing**
Í høvuðsheitum umfatar starvið skrivarauppgávur fyri leiðsluna. Starvið umfatar eisini sjúklingaskráseting, toll- & telefonavgreiðsla, skjalasavn og hjálp í bókhaldinum

**Førleikakrøv**
Tað er fyrimunur, at tann, ið settur verður, hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving. Eisini skal viðkomandi hava kunnleika at arbeiða við teldu.
Harumframt skal viðkomandi verða fyrikomandi, arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir**
Løn og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suðuroyar Sjúkrahús, Jónvør Bjarkhamar tlf. 37 11 33 lokal 136.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

Umsjónarmannin
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

í seinasta lagi 26. mars 2004.

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi/hjálpara til 13 ára gamlan drong í Klaksvík at byrja 1. apríl 2004.

Arbeiðið hjá stuðlinum er í samstarvi við drongin og stuðlsráðgevan at stuðla dronginum í at fáa ein innihaldsríkan dag.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna og er fyribils játtað til 1. februar 2005.

Ynskiligt er at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til jóruna Niclasen, stuðuslráðgeva ella Súsonnu Gaard, sosialráðgeva.

Umsóknir við møguligum avritum av prógvi vera at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
Klaksvíkar Kommuna
postboks 2 · FO-700 Klaksvík

í seinasta lagi 22. mars 2004.



Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## PROJEKTLEIÐARAÚTBÚGVING
### - hvussu verði eg ein góður projektleiðari?

**Hold 1 varð liðugt í januar 2004 við góðari eftirmeting, hold 2 byrjar 22. apríl 2004**

Høvuðsendamálið við útbúgvingini er at læra, hvat góð projektleiðsla er og venja seg í at vera góður til tað.

**Innihald**
- hvat er góð projektleiðsla og hvussu verði eg ein góður projektleiðari?
- projektleiðara-leikluturin frá byrjan til enda
- hvussu velji eg tað rætta projektstýringsmodellið?
- amboð hjá einum projektleiðara
- fellur í teimum ymisku projektstigunum og hvussu ein sleppur undan hesum
- gerð av projektætlan við virksemisyvirliti, tilfeingisyvirliti og tíðarætlan
- hvussu tú skapar motivatión og áhuga, tá ið tú skalt byrja eitt projekt, og hvussu tú samansetur og mennir ein projektbólk

**Málbólkur**
Útbúgvingin er fyri núverandi og komandi projektleiðarar, sum ikki hava eina teoretiska útbúgving, men hava tørv á grundleggjandi fyritreytum og amboðum innan projektleiðslu og -stýring. **Útbúgvingin varir 6 dagar, og skift verður ímillum modul, sum vara 2 dagar hvørt, og heimauppgávur við støði í tínum projektum, sum samantvinna teori og praktiskt arbeiði.**

**Modul 1:** Neyv lýsing av projektætlanini, projektavmarking, áseting av endamálinum, vanlig stig í einum projekti, áhuga -og tilfeingisgreining, samanseting av tí best hóskandi verkskipanini, byrjan av projekti og ígongdsetan av projektbólki.

**Modul 2:** Tíðar og virksemisætlan herundir KT-amboð, kritiski vegur/virksemi hjá projektinum, vandagreining og meting av projekttíð og búskapi, virkisætlan, projektfrágreiðing.

**Modul 3:** Leikluturin hjá projektleiðaranum og leiðarauppgávur, bólkamenning, ósemjur og handfaring av hesum, uppgerð av projektinum og eftirmetingar.

**Tíðarskeið:** 21. og 22. apríl
26. og 27. mai
10. og 11. juni
allar dagar kl. 08.30-16.00

**Tilmelding:** áðrenn 2. apríl 2004

Meira um útbúgvingina er á: **www.skeiðsdepilin.fo**, har kanst tú eisini tekna teg til.
Tilmeldingarblað, tilfar og tíðarætlan fæst eisini við at venda sær til

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo


**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo


# Lógarsavnið hjá Toll- og skattstovuni 2004




**Lógarsavnið hjá Toll- og Skattstovuni 2004**, sum Toll- og skattstova Føroya gevur út, er nú komið. Bókin, sum er 351 síður til støddar, er í fikkustødd og kostar 100 kr.

Í bókini eru allar toll-, mvg- og avgjaldslógir, 33 í tali, sum Toll-og skattstovan umsitur

**Lógarsavnið hjá Toll- og skattstovuni 2004** fæst til keyps í bókabúðunum og á Økisskrivstovunum kring landið, í Tórshavn tó í Tollbúðuni.

**Argir, 9. mars 2004**
**Toll- og Skattstova Føroya**




# Sethús í Tvørgøtu 27, Tórshavn til sølu



Húsini eru í 3 hæddum, hvør 50 fermetrar.

Grundøkið er 158 fermetrar.

Á loftinum eru 3 kømur, baðirúm og gongd.

Í miðhæddini eru køkur við nýggjum hvítvørum og borðplátum, 2 stovur og gongd.

Í kjallarahæddini er sjálvstøðug íbúð við kamari, stovu, køki, wc, baðirúm og gongd.

Í tilbygningi er stórur hjallur og fýr- og vaskirúm.

Uttanfyri húsini er urtagarður og stoyptur garður er runt um húsið.

Húsini standa í barnavinarligum, friðarligum, veðurgóðum umhvørvi og tó bert 5 min. frá miðbýnum.

Myndir av húsinum kunnu síggjast á www.vitin.fo.

Kostnaður 1.300.000 ella hóskandi boð.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Tlf. 313858 ella 553355**